# Kringvarpið spardi 9 milliónir í 2009

**Kringvarp Føroya megnaði at spara góðar 9 milliónir krónur í 2009, samanborið við 2008. Hetta er omanfyri 13 prosent av samlaðu útreiðslunum. Tað vísa fyribilstøl, sum Sosialurin hevur fingið hendur á**

KRINGVARP
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*Kringvarp Føroya megnaði at spara 9 milliónir krónur í 2009 í mun til 2008. Men hóast stóru sparingina, endaði árið við halli*
Savnsmynd

»Hetta hevur verið hart«. Orðini eigur Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, sum – hóast nógv rumbul seinasta árið – hevur megnað at spart góðar 9 milliónir krónur á stovninum í 2009, samanborið við 2008.

Í prosentum svarar hetta til eina sparing á omanfyri 13 prosent. Til samanlíkningar kann nevnast, at Løgtingið fyri 2010 hevur álagt øllum ráðunum at spara 2 prosent á sínum øki.

Annika Mittún Jacobsen sigur, at hon veruliga má rætta eina hond til starvsfólkini. – Tað hevði ikki borið til uttan teirra hjálp, at tey vóru villig til at strekkja seg eitt sindur longur, sigur hon.

Hóast Kringvarpið hevur spart heilar 9 milliónir krónur, stava bert 1 – 2 milliónir krónur frá lønar- og sýningarposanum.

Hinar 7-8 milliónirnar eru spardar undir øðrum rakstrarútreiðslum.

Annika Mittún Jacobsen greiðir frá, at tey veruliga hava verið runt allastaðni eftir hesum sparingunum. Eitt nú hava tey veruliga skorið niður á keyp av freelance tænastum og øðrum eksternum tænastum.

## Hall hóast sparing

Men hóast Kringvarpið hevur spart 9 milliónir krónur í fjør, gjørdist endaliga úrslitið eitt hall á eina hálva millión krónur, og er hetta orsakað av, at inntøkurnar hjá Kringvarpinum fullu meira enn væntað.

Inntøkurnar hjá Kringvarpinum fullu úr 64,7 milliónum í 2008 til 58,5 milliónir krónur í 2009.

Fallið stavar í høvuðsheitum frá inntøkum í lýsingum, sum fullu 700.000 krónur, og frá spæliinntøkum, sum fullu 3,3 milliónir krónur. Harumframt fall inntøkan av kringvarpsgjaldi við 1,1 millión krónur.

Annika Mittún Jacobsen greiðir frá, at 2008 var eitt serliga gott ár hjá Gekkinum, og tí vóru inntøkurnar so stórar frá spæli í 2008, og at hetta ikki var førið í 2009.

At inntøkurnar av Kringvarpsgjaldi eru falnar, sigur Kringvarpsstjórin, at hetta hevur nakað við kreppuna at gera.

- Lógarverkið er skrúvað soleiðis saman í løtuni, at um fólk ikki vilja gjalda Kringvarpsgjald, og siga, at tey ikki hava sjónvarp ella útvarp, so kunnu vit ikki gera so nógv við tað, sigur Annika Mittún Jacobsen.


# ORKUTØKNINGUR TIL MAGN

## Vit sóknast eftir orkutøkningi til Magn Hitatænastuna í Suðurstreymi

**Um Magn**
Magn tryggjar orku til Føroyar og føroyingar. Vit eru 130 starvsfólk, svarandi til 80 ársverk. Høvuðsskrivstova okkara er í Havn og deildarskrivstovur eru í Klaksvík og á Tvøroyri. 10 service støðir bera Magn navnið, av hesum eigur Magn tær 4. Vit hava goymslur í Klaksvík og í Havn, og mált uppá sølu eru vit ein av Føroya størstu fyritøkum.

**Um starvið**
Hitatænastan hjá Magn tekur sær av árligum eftirliti og tænastuvakt til okkara sethúsa- og virkiskundar. Árliga eftirlitið umfatar millum annað reinsan av oljufýri og ketli og kannan og stillan av oljufýri. At oljufýrið er stillað rætt verður tryggjað við eftirlitsmátingum. Øll úrslit og tilmæli verða skrásett í eftirlitsbók.

**Um hitatænastuna er annars at siga:**
Tænastan er besta trygd fyri eini vælvirkandi oljufýrsskipan, tvs. eingin óneyðug oljunýtsla og munandi minni vandi fyri sótskaðum við meira. Tað arbeiða í alt 9 ábyrgdafullir, raskir og vællærdir orkutøkningar í Hitatænastuni hjá Magn, og hesir tryggja sethúsum og virkjum í øllum landinum hita allar 365 dagarnar um árið. Um skipan óeydnutíð sløknar, er hjálpin tó skjót og nær.

**Uppgávur í stuttum:**
- Árligt reins, eftirlit og innstilling av størri og minni hitaverkum í Suðurstreymi.
- Tænastuvakt 4. hvørja viku
- Veita kundum okkara bestu ráðgeving um orku og orkuverk teirra.
- Tryggja okkara høga tænastustøðið
- Verða ein partur av framhaldandi menningi av Magn hitatænastuni.

**Vit bjóða:**
Eitt gott, avbjóðandi og ábyrgdarfult starv í eini fyritøku í menning. Her er vítt til veggja, og um vilt og dugir, so sleppur tú eisini. Tað er avgerðandi, at tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og at tú loysir tínar uppgávur væl. Av hesi orsøk fært tú góðan stuðul og alla neyðuga upplæring og útbúgving.

**Vit vænta:**
- Viðkomandi handverkaraútbúgving, so sum rørsmiðjur, maskinsmiðjur, elektrikari ella líknandi.
- At tú ert tænastusinnað/ur og góð evni at samskifta og samstarva
- At tú hevur áræði og dugur at arbeiða sjálvstøðug.

**Okkara virði eru:**
- Kundin í fokus
- Vitan og førleiki leingi livið
- Skjótt er gott
- Gleiði gevur megi.

Um tú umhugsar at søkja starvið, vinarliga fær inn á www.magn.fo og hygg nærri eftir, hvussu vit á Magn arbeiða við virðum felagsins í okkara dagliga arbeiði.

Hevur tú spurningar, vinarliga vend tær til Leif Hovgaard á telefon 347443, 237443 ella á leif@magn.fo

Umsóknir við prógvum skulu latast inn innan 07. februar kl. 16.00. Antin við at senda bræv til:

***Magn***
***Vestara Bryggja 10***
***FO-110 Tórshavn***
***Att.: Leif Hovgaard***

Ella við at senda teldupost til leif@magn.fo

www.magn.fo

magn TÍN ORKA